Almannamálaráðið

Løgtingið

Dagfesting:	8. desember 2020
Mál nr.:	20/00640-25
Málsviðgjørt:	JEB
Eftirkannað:	27. oktober 2020

Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um at byggja tveir vardar bústaðir í Tórshavn (Sambýlið á Mýrini í Hoyvík)

Uppskot til

Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um at byggja tveir vardar bústaðir í Tórshavn
(Sambýlið á Mýrini í Hoyvík)

§ 1

Í løgtingslóg nr. 59 frá 30. apríl 2018 um at byggja tveir vardar bústaðir í Tórshavn verða gjørdar hesar broytingar:

1. Heitið á lógini verður orðað soleiðis:

"**Løgtingslóg**
um
at byggja ein vardan bústað í
Tórshavn"

2. Í § 1, stk. 1 verður "tveir vardar bústaðir" broytt til: "ein vardan bústað" og "§ 32 í forsorgarlógini" broytt til "§ 46 í løgtingslóg um almannatrygd og tænastur".

3. Í § 1, stk. 2 verður "58 mió. kr." broytt til: "46 mió. kr."

§ 2

Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Kapittul 1. Almennar viðmerkingar

1.1. Orsakir til uppskotið

Í 2018 samtykti Løgtingið at heimila landsstýrismanninum at byggja tveir vardar bústaðir í Tórshavn til fólk við menningartarni fyri í mesta lagi 58 mió. kr. Tá lógaruppskotið varð samtykt, var bara byggiskráin gjørd, og farið var ikki undir sjálva byggifyrireikingina (prosjekteringina).

Í sambandi við byggifyrireikingina av fyrra bústaðnum, sum skal byggjast á Mýrini í Hoyvík, er vorðið greitt, at metti byggikostnaðurin í lógaruppskotinum var ov lágur, og at tað ikki er gjørligt at byggja báðar bústaðirnar innan fíggjarkarmin á 58 mió. kr.

Ætlanin um at byggja seinna bústaðin er ikki slept, men farið er ikki undir at fyrireika byggiverkætlanina, og kostnaðurin er óvissur. Tí ber ikki til í løtuni at gera eina haldgóða meting av, hvat samlaði kostnaðurin av at byggja bæði sambýlini fer at verða.

Ásannandi støðuna, sum hevur verið seinastu tíðina í sambandi við almennu byggiverkætlanirnar og viðmerkingarnar frá Løgtingsins Fíggjarnevnd um, at tað er umráðandi, at verkætlanirnar eru so væl fyrireikaðar sum gjørligt, áðrenn tær verða lagdar fyri Løgtingið, verður mett rættast at broyta lógina frá at byggja tveir vardar bústaðir til fyrst at byggja ein vardan bústað.

Fíggjarmálaráðið og Landsverk mæla til, at lógaruppskot verða løgd fyri Løgtingið, tá verkætlanaruppskotið er liðugt. Tá verður mett, at neyvleikin í kostnaðarmetingini er størri. Tvey stig eru tá eftir í byggifyrireikingini, áðrenn arbeiðstøkan kann bjóðast út. Tað er ikki fyrr enn tilboðini uppá arbeiðstøkurnar eru komin inn, at kostnaðurin er kendur.

Fíggjarmálaráðið mælir til at leggja 15 % oman á handverkaraútreiðslur (HVÚ), meira- og minniveiting, eykaarbeiði og prísvøkstur. Sambært verkætlanaruppskotinum er henda útreiðslan til samans 32,5 mió. kr. Óvissan (15 %) verður mett at verða 4,9 mió. kr. Tilsamans verður mett, at verklagið samlað fer at kosta 46,1 mió. kr.

Fleiri av verandi bústøðum í Tórshavn til fólk við menningartarni eru í gomlum og slitnum sethúsum, ið ikki eru hildin við líka, og sum aloftast ikki eru hóskandi til endamálið. Eirargarður er einasti vardi bústaður í Tórshavn, sum er bygdur til fólk við menningartarni.

Tey bæði sambýlini á Mýrini í Hoyvík, sum hesin vardi bústaðurin kemur í staðin fyri, eru tikin niður.

Við hesum uppskotinum fáa fólk við menningartarni hóskandi karmar um privatlív og felagslív, umframt at karmarnir styðja undir, at borgarin kann nýta sínar førleikar og gerast so sjálvbjargin sum gjørligt.

Eisini fara karmarnir at styðja undir, at borgarin kann liva eitt vanligt lív, har familja og vinfólk koma á vitjan, uttan at hetta skal órógva restina av teimum, ið viðkomandi býr saman við.

Innihaldið í varda bústaðnum er nærri lýst í verkætlanaruppskotinum, sum er lagt við sum fylgiskjal 2.

1.2. Galdandi lóggáva

Galdandi lóggáva er løgtingslóg nr. 59 frá 30. apríl 2018 um at byggja tveir vardar bústaðir í Tórshavn.

Vardir bústaðir er felagsheitið fyri bútilboð skipaði við heimild í § 46 í løgtingslóg nr. 72 frá 25. mai 2020 um almannatrygd og tænastur. Vardir bústaðir eru ætlaðir persónum við týðandi likamligum ella sálarligum breki ella víðfevndum sosialum trupulleikum, og sum tørva hjálp og stuðul til vanligt dagligt virksemi, umframt møguliga røkt. Vardir bústaðir kunnu skipast sum búfelagsskapir, sambýli og røktarbústaðir.

Sambýli eru sermerkt við sjálvstøðugum íbúðum, felagshøli og felags virksemi. Sambýli skulu rúma meira starvsfólkaorku, eins og sambýli eisini í størri mun fevna um serligar bústaðarloysnir til serstakar tørvir hjá ávísum málbólkum. Sambýli eru fyri borgarar, sum í størri mun hava tørv á at hava starvsfólk um seg allan dagin ella fólk, sum ynskja ein tættan felagsskap við onnur.

Av tí at tað í sambandi við byggifyrireikingina er vorðið greitt, at til ber ikki at byggja tveir vardar bústaðir fyri 58 mió. kr., verður galdandi løgtingslóg broytt, soleiðis at til ber til at byggja annan bústaðin, og heimildin verður broytt samsvarandi kostnaðarmetingini í verkætlanaruppskotinum (ella "prosjektuppskotinum", sum tað kallast í byggivinnuni) umframt 15 % óvissu á handverkaraútreiðslur (HVÚ), meira- og minniveiting, eykaarbeiði og prísvøkstur.

1.3. Endamálið við uppskotinum

Endamálið við lógaruppskotinum er at veita heimild til at útvega ein vardan bústað í Tórshavn til fólk við menningartarni.

1.4. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum

Lógaruppskotið hevur við sær, at bústaðakarmarir í Tórshavn til fólk við menningartarni gerast betri og meira tíðarhóskandi.

Lógaruppskotið fevnir um at byggja eitt sambýli í Hoyvík til 18 fólk. Við hesi verkætlan verður bygt til endamálið og búfólkini fáa sjálvstøðugar íbúðir, har umstøðurnar eru virðiligar og gevur teimum meira privatlív. Samstundis eru starvsfólk um tey, og veita teimum ta røkt og umsorgan, teimum tørva.

Sambýlið fevnir um tríggjar eindir við 6 búfólkum í hvørji eind. Tvær eindir, sum eru á veghædd, fevna um sjálvstøðugar íbúðir á umleið 40-50 m^2 brutto. Knýtt at hvørji av hesum báðum eindunum verður køkur/stova. Í aðrari eindini er køkurin størri og kann matgera til øll búfólkini.

Triðja eindin fevnir um vanligar tvey-rúms íbúðir á umleið 55 m^2 brutto við egnari inngongd, sum er í erva, har til ber at ganga beinleiðis inn í íbúðina, uttan at fara inn í sambýlið í neðra.

Umframt búeindirnar hevur sambýlið felags hentleikar, so sum starvsfólkarúm, starvsfólkaumklæðing, vesi, baðirúm, leiðaraskrivstovu, dur, gongd, sansarúm og hvílirúm til búfólkini, vaskirúm og goymslu.

1.5. Ummæli og ummælisskjal

Lógaruppskotið er sent til ummælis hjá:

MEGD

Javna
Fíggjarmálaráðnum
Landsverki

Viðgerð av viðmerkingum

MEGD hevur ikki viðmerkingar til uppskotið, men ger vart við, at tað er ørkymlandi, at tað gongur so seint at útvega bústaðir til fólk við breki í Suðurstreymoy, samstundis sum at bíðilistin veksur. MEGD heitir á myndugleikarnar at fáa ferð á byggingina av bústøðum í Suðurstreymoy til fólk við breki.

Javni vísir eins og MEGD á, at tørvurin á vardum bústøðum til fólk við menningartarni, serliga í Suðurstreymi, er ovurstórur, og mælir staðiliga til, at hildið verður fast í at byggja báðar bústaðirnir, sum upprunaliga ætlað.

Landsstýrismaðurin leggur dent á, at ætlanin at byggja seinna varda bústaðin er ikki slept, men av tí at farið ikki er undir at prosjektera seinna bústaðin, ber ikki til at meta um, hvat seinni bústaðurin fer at kosta. Lógin verður broytt nú, soleiðis at seinna verkætlanin ikki forðar fyri, at Sambýlið á Mýrini verður bygt nú.

Fíggjarmálaráðið hevur í samskifti við Landsverk víst á, at 15 % óvissan skal leggjast á HVÚ, meira- og minniveiting, eykaarbeiði og prísvøkstur. Landsverk hevur upplýst, at sáttmáli er gjørdur um fastan prís um ráðgeving, íroknað byggileiðslu og fakeftirlit, sostatt verður óvissa ikki roknað á ráðgevaraútreiðslur.

Í prosjektuppskotinum metir ráðgevin um HVÚ og innbúgv. Landsverk metir, at óvissa á 15 % eigur at verða lagt á hesar postar. Av tí at meira- og minniveitingar, eykaarbeiðir og prís- og lønarvøkstur er tengt at HVÚ, verður hesi reguleraði í mun til økt HVÚ. Av tí at talan ikki er um longda byggitíð, er ikki neyðugt at roknað 15 % í óvissu á verkætlanarleiðslu. Málásettar útreiðslur er altíð ein meting. Landsverk metir tað ikki verða neyðugt, at leggja 15 % óvissu oman á hesar útreiðslur.

Fíggjarmálaráðið metir ikki, at tað er neyðugt at leggja 15 % óvissu á innbúgvsmetingina. Hetta verður tikið til eftirtektar.

Av hesum eru longu hildnar útreiðslur til fyrireiking, prosjektering, burturtøku av bygningum og verkætlanarleiðslu fram til at broytingaruppskotið er lagt fyri Løgtingið, fyri umleið 3 mió. kr.

Fíggjarmálaráðið mælir til, at ásettu útreiðslurnar í verklagslógini er heimildin frameftir at gera avtalur, og ikki útreiðslur, ið longu eru hildnar. Fíggjarmálaráðið metir, at samlaði metti kostnaður av verkætlanini, t.e. útreiðslur, ið eru hildnar, og tær útreiðslur, ið landsstýrismaðurin kann gera avtalur fyri, eftir at broytingaruppskotið er samtykt, skal upplýsast í viðmerkingunum. Almannamálaráðið metir hinvegin, at longu hildnar útreiðslur eru brúktar við heimild í galdandi lóg um at byggja tveir vardar bústaðir, og at tað tí er rættast, at samlaði kostnaðurin av verklagnum stendur í lógarteksturin, meðan tað í viðmerkingunum verður upplýst, at partur av játtanini er longu brúktur til fyrireiking o.a., tað er umleið 3 mió. kr. Landsstýrismaðurin kann ikki gera avtalur, sum fara upp um samlaðu játtanina til verklagið, uttan at nýtt broytingaruppskot verður samtykt í Løgtinginum.

Fíggjarmálaráðið vísir á, at tað er týdningarmikið, at tá HVÚ ella partar av HVÚ verða bjóðað út, at kunnað verður um metta kostnaðin, so tað verður greitt fyri øllum, at parturin til HVÚ er

28,3 mió. kr. + 15 %, og ikki hvat samlaða verklagið er mett at kosta. Tikið verður undir við hesum.

Landsverk hevði onga viðmerking til lógaruppskotið, men vísir á, at mest loyvdi kostnaðurin sambært sáttmála við ráðgevarar fyri alla verkætlanina skal ikki fara uppum 41,2 mió. kr. 15 % áljóðandi 6,2 mió. kr. eigur at verða sett av til óvissur, men skal byggiharri, bygginevnd og ráð arbeiða miðvíst fyri at kostnaðurin á 41,2 mió. kr. verður hildin.

Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum

2.1. Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur
Kostnaðurin av at byggja nýtt sambýli er mettur at vera í mesta lagi 46 mió. kr. Útreiðslurnar verða fíggjaðar við 455 tús. kr. í 2018, 1,6 mió. kr. í 2019, 4,4 mió. kr. í 2020, 17,4 mió. kr. í 2021 og 22,3 mió. kr. í 2022. Sí eisini fylgiskjal 5.

Lógaruppskotið fer at hava við sær øktan rakstur.

Í upprunalógini frá apríl 2018 varð mett, at byggingin av vardu bústøðunum ikki fór at hava við sær hægri rakstrarútreiðslur og tískil er ikki er neyðugt at seta hægri játtan av til rakstur.

Fortreytirnar eru broyttar síðani tá. Búfólkini, sum áður búðu á Mýrini, eru flutt til aðrar bústaðir á Argjum og Tórshavn, harundir bústaðir, sum eru útvegaðir eftir, at lógaruppskotið frá 2018 varð samtykt. Eisini er farið frá ætlanunum um at niðurleggja allar verandi bústaðir, tá nýggir bústaðir verða bygdir. Millum annað hevur Løgtingið samtykt lógina um at dagføra vardar bústaðir 7. juni 2020, ið eisini fer at útvega fleiri búpláss.

Samlaði talið av bústøðum økist tí við hesum lógaruppskoti, men ilt er í løtuni at meta nágreiniliga um, hvussu nógv raksturin við hesum sambýli fer at økjast.

Vegleiðandi ber til at upplýsa, at eitt plás á sambýli til fólk við menningartarni kostar umleið 760 tús. kr. um árið, og eitt plás í búfelagsskapi umleið 249 tús. kr. um árið.

Leiguprísurin er ikki ásettur, men verður roknað við eini húsaleigu á 4.500 kr. pr. mðr., verður leiguinntøkan 972.000 kr. Nettoútreiðslan til rakstur av nýggja sambýlinum á Mýrini 4-6 verður mett til at verða 9.642.930 kr.

2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur
Lógaruppskotið hevur ikki umsitingarligar avleiðingar fyri land ella kommunur.

2.3. Avleiðingar fyri vinnuna
Lógaruppskotið hevur við sær økt virksemi fyri byggivinnuna.

2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið
Lógaruppskotið hevur jaligar avleiðingar fyri umhvørvið. Bygningurin skal hitast upp við varandi orkukeldum, og minst møgulig orka skal brúkast til upphiting og rakstur av bygningi.

2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum
Sambýlið verður bygt í Suðurstreymoy og fer saman við øðrum byggiætlanum munandi at betra um bústaðaumstøðurnar hjá fólki, ið bera brek og hava tørv á vardum bústaði í Suðurstreymi.

Í mun til teir borgarar, sum í dag búgva í ótíðarhóskandi bústøðum og sum flyta inn í nýggju bústaðirnar, hækkar mánaðarliga húsaleigan í mesta lagi úr 2.500 kr. pr. mðr. í dag og til 4.500 kr. pr. mðr., ið svarar til húsaleiguna í nýggjastu bústøðunum kring landið.

2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir
Lógaruppskotið hevur við sær, at persónar, ið bera brek, fáa munandi betri og meira hóskandi bústaðarumstøður enn áður.

2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum
Ongir millumtjóðasáttmálar eru á økinum.

2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar

1) **Hoyvíkssáttmálin**
   Lógaruppskotið hevur ikki avleiðingar í mun til Hoyvíkssáttmálan.

2) **Evropeiski mannarættindasáttmálan, EMRS**
   Lógaruppskotið hevur ikki avleiðingar í mun til mannarættindasáttmálan, EMRS.

3) **Sáttmáli Sameindu Tjóða um rættindi hjá einstaklingum, ið bera brek**
   Lógaruppskotið stuðlar undir ST-sáttmálan um rættindi hjá einstaklingum, ið bera brek. Sáttmálin varð settur í gildi fyri Føroyar tann 23. august 2009.

   Sambært grein 19 í breksáttmálanum viðurkenna limalondini rættin hjá øllum fólkum, ið bera brek, at liva í samfelagnum á jøvnum føti við onnur og við somu valmøguleikum. Limalondini skulu viðurkenna, at fólk, ið bera brek, sleppa at velja sær bústað og velja hvar og saman við hvørjum, tey vilja liva.

   Sambært grein 28 í breksáttmálanum viðurkenna limalondini, at fólk, ið bera brek, hava rætt til nøktandi lívskor og tískil eisini rætt til nóg góðan bústað. Somuleiðis viðurkenna limalondini, at fólk, ið bera brek, sleppa upp í almenn bústaðartiltøk.

   Lógaruppskotið er eitt stig á leiðini at lúka hesar ásetingarnar.

2.9. Markaforðingar
Ongar markaforðingar eru á økinum.

2.10. Revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv
Lógaruppskotið hevur ongar ásetingar um revsing, útpanting, sektir ella onnur størri inntriv.

2.11. Skattir og avgjøld
Lógaruppskotið hevur ongar ásetingar um skattir ella avgjøld.

2.12. Gjøld
Lógaruppskotið hevur ongar ásetingar um gjøld.

2.13. Áleggur lógaruppskotið likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur?
Lógaruppskotið áleggur ikki fólki skyldur.

2.14. Leggur lógaruppskotið heimildir til landsstýrismannin, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur?
Lógaruppskotið leggur ikki heimildir til landsstýrismannin, ein annan enn landsstýrismannin ella kommunur.

2.15. Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd til privata ogn?
Lógaruppskotið gevur ikki almennum myndugleikum atgongd til privata ogn.

2.16. Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar?
Lógaruppskotið hevur ikki aðrar avleiðingar.

2.17. Talvan: Yvirlit yvir avleiðingarnar av lógaruppskotinum

	Fyri landið ella landsmyndug-leikar	Fyri kommunalar myndugleikar	Fyri pláss ella øki í landinum	Fyri ávísar samfelags-bólkar ella felagsskapir	Fyri vinnuna
Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar	Ja	Nei	Nei	Nei	Ja
Umsitingarligar avleiðingar	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Umhvørvisligar avleiðingar	Ja	Nei	Nei	Nei	Nei
Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur	Ja	Nei	Nei	Ja	Ja
Sosialar avleiðingar			Ja	Nei	

Kapittul 3. Serligar viðmerkingar

3.1. Viðmerkingar til ta einstøku greinina

Til § 1
Heitið á løgtingslógini verður broytt samsvarandi broyttu ætlanini hjá landsstýrismanninum, har farið verður frá ætlanini um at byggja tveir vardar bústaðir til at byggja ein vardan bústað, tí tað hevur víst seg, at upprunaliga kostnaðarmetingin ikki helt.

Við Tórshavn er at skilja Tórshavn, Argir og Hoyvík.

Vardir bústaðir sambært § 46 í løgtingslóg nr. 72 frá 25. mai 2020 um almannatrygd og tænastur kunnu skipast sum búfelagsskapir, sambýlir og røktarbústaðir. Ítøkiliga er ætlanin at byggja eitt sambýli til fólk við menningartarni.

Heimildin at byggja fyri 58 mió. kr. verður broytt til 46 mió. kr.

Hetta byggir á kostnaðarmetingina í verkætlanaruppskotinum, umframt 15 % á handverkaraútreiðslur (HVÚ), meira- og minniveiting, eykaarbeiði og prísvøkstur.

Kostnaðarmetingin í verkætlanaruppskotinum er 41,2 mió. kr. Fíggjarmálaráðið hevur mælt til, at 15 % verður lagt oman á kostnaðarmetingina av handverkaraútreiðslum (HVÚ), meira- og minniveiting, eykaarbeiði og prísvøkstur, ið er til samans 32,5 mió. kr., og er óvissan á 15 % av hesum 4,9 mió. kr. Tilsamans verður mett, at samlaða útreiðslan fyri verklagið verður 46,1 mió. kr. Upphæddin verður rundað til 46 mió. kr.

Av hesum eru longu umleið 3 mió. kr. hildnar til fyrireiking, prosjektering, burturtøku av bygningum og verkætlanarleiðslu fram til hetta broytingaruppskotið er lagt fyri Løgtingið.

Til § 2
Eingin viðmerking er til greinina.

Almannamálaráðið, 8. desember 2020

Elsebeth Mercedis Gunnleygsdóttur
landsstýrismaður

/ Eyðun Mohr Hansen

Yvirlit yvir fylgiskjøl:
Fylgiskjal 1: Javntekstur
Fylgiskjal 2: Verkætlanaruppskot
Fylgiskjal 3: Byggiskrá
Fylgiskjal 4: Tíðarætlan
Fylgiskjal 5: Útreiðslur býttar yvir ár
Fylgiskjal 6: Hoyringarsvar frá MEGD

Fylgiskjal 7: Hoyringarsvar frá Javna
Fylgiskjal 8: Hoyringarsvar frá Fíggjarmálaráðnum
Fylgiskjal 8a: Viðheft skjal til hoyringsvarið frá Fíggjarmálaráðnum
Fylgiskjal 9: Hoyringsvar frá Landsverki
Fylgiskjal 10: Virksemisætlan Mýran 4-6 (nýggjur stovnur við 18 búplássum) Almannaverkið